## Oljumálastýrið

# Fulltrúi til Oljumálastýrið

Oljumálastýrið søkir eftir einum fulltrúa í umhvørvisspurningum sum heild.

**Høvuðsuppgávurnar** hjá fulltrúanum verða m.a.:
- at ráðgeva landsstýrismanninum í umhvørvismálum
- at luttaka í lógarfyrireikandi arbeiði
- at samstarva við aðrar føroyskar myndugleikar á umhvørvisøkinum
- at luttaka í norðurlendskum og altjóða umhvørvissamstarvi
- at luttaka í arbeiðinum við at orða ein umhvørvispolitikk

Oljumálastýrið er nýtt stýri og arbeiðsuppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar. Tann, ið settur verður, má tí rokna við, at starvsøkið kann verða broytt sum frálíður.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum, at umsøkjarar
- hava útbúgving sum løgfrøðingur, samfelagsfrøðingur ella aðra viðkomandi útbúgving
- duga føroyskt og enskt
- hava arbeiðsroyndir frá vinnulívi ella myndugleika

**Oljumálastýrið bjóðar**
Eitt fulltrúastarv við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeitt verður í einum spennandi umhvørvi á høgum fakligum stigi og møguleikarnir fyri persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um Oljumálastýrið og stovnar undir hesum, aðalstýrini og løgmansskrivstovuna.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, CV o.ø. skal sendast til:

Oljumálastýrið
Postsmoga 1162
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15.5.2000. Starvið verður sett skjótast til ber. Ynskjast fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Oljumálastýrið á tlf. 31 19 44 og tosa við Herálv Joensen, aðalstjóra.

Oljumálastýrið er nýskipað stýri undir landsstýrismanninum í olju- og umhvørvismálum. Stýrið umsitur kolvetnisvirksemi og umhvørvi. Uppgávurnar í stýrinum fevna um fyrireiking av útbjóðingarumførum, tilfeingisumsiting, trygdar- og umhvørvisumsiting v.m.

KPMG

## Sterkstreymsverkfrøðingur ella el-installatørur

Fyri P/F Eyðun Jespersen søkja vit eftir einum sterkstreymsverkfrøðingi ella einum el-installatøri at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Tann, ið settur verður, kemur at hava beinleiðis tilvísing til stjóran og skal saman við stjóranum skipa el-arbeiðið hjá felagnum umframt hava ábyrgdina av útrokning av tilboðum v.m.

Talan er um eitt avbjóðandi og áhugavert starv við góðum framtíðarmøguleikum.

**Umsøkjarin**
Umsøkjarin skal verða útbúgvin sterkstreymsverkfrøðingur, góðkendur el-innleggjari ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

Eisini skal viðkomandi hava góð samstarvsevni, vera fryntligur og fyrikomandi, og vera til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, um tørvur er á tí.

**Umsóknin**
Umsóknin við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til KPMG statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber og í seinasta lagi 1. mai 2000.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Mirjam Haraldsen á tel 34 34 34.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

***Høvuðsvirksemi hjá P/F Eyðun Jespersen fevnir um sølu, umvæling og endurvindan av el-motorum, generatorum o.ø., umvæling og framleiðslu av køliútbúnaði, umframt vanliga el-innlegging.***
***Virksemi felagsins er í støðugari øking. Í løtuni starvast 9 fólk hjá felagnum.***

team 85 • 31 65 11

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn
Tel 34 34 34 Fax 34 34 35




*Leverandørurin til entreprenørar í 28 ár...* Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

**Sildagoymslan**

**Nú er sildin seld**

*Vit ynskja øllum okkara keyparum einar gleðiligar páskir!*

**Sagt verður frá, tá sild verður aftur á goymslu**

**Sildagoymslan**

**AMBOÐ**

*Gevind amboð - AC amboð*
*- Tente hjól - Ketusagir*
*- alt til drejibenkur*
*- Trýstspularar - Sveisitól*
*- Luftkompressarar - Taljur*
*- Stroppar - Skjótiseym*
*- Sláimaskinur - Støvsúgvarar*
*- Stigar - Flakaknívar*
*- El-aggregat - Laditól*
*- El- og hondamboð*
*- Luftslangur - Spulislangur*
*- útleiguamboð - Umvæling.*

Keyp har tú fært mest fyri pengarnar.
Góð servica.
*Keyp frá fakmanninum ...*

**Tórshavnar Maskinhandil**
*v/ Tummas Andreasen*
Varðagøta 29-30 - Tlf. 313442

*Lýsið í* **sosialinum**

## Miðnámsskúlin í Suðuroy

Frá 1. august 2000 eru, treytað av hvørji valfak verða stovnað, 2–3 føst størv, treytað av lærugreinasamansetingum, leys at søkja í hesum lærugreinum:
**Evnafrøði, týskum, enskum, alisfrøði, alis/evnafrøði, geografi, samfelagsfrøði, sálarfrøði, tónleiki, tøkn**i.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum YF (Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara) og Føroya Landsstýri.

Umsókn á oyðublaði frá YF verður stílað til Undirvísingar- og mentamálastýrið, Tórshavn, men verður sent deildarleiðaranum:
Ole V. Laursen, Miðnámsskúlin,
FO 900 Vágur

Avrit av prógvum ella úrskrift av próvtøkubók skal hjáleggjast.

Umsóknir skulu vera deildarleiðaranum í hendi í seinasta lagi 3. mai 2000.



KPMG

# Grannskoðarar við royndum og ungir grannskoðarar

Orsakað støðugt vaksandi virksemið og av tí at tveir av okkara grannskoðarum fara at fáa sær víðari útbúgving hjá ávíkavist KPMG í Keypmannahavn og KPMG í Madrid, hava vit brúk fyri at seta fleiri grannskoðarar í starv til heystar.

**Starvslýsing**
Arbeiðið fevnir um grannskoðan, roknskaparhjálp og eina røð av øðrum tænastum til føroyskar og útlendskar privatar fyritøkur innan flest allar vinnugreinar, eins og til kommunur og almennar stovnar v.fl.

### Grannskoðarar við royndum og/ella við ástøðiligari útbúgving

**Útbúgvingin**
Umframt at fáa hollar arbeiðsroyndir gjøgnum tað dagliga arbeiðið, skulu tey, sum verða sett í starv, nema sær víðari ástøðiliga útbúgving.

Harumframt verður talan um innanhýsis undirvísing, bæði hjá okkum og hjá KPMG í Danmark.

**Umsøkjarin**
Roknað verður við, at umsøkjarar hava útbúgving sum siviløkonomar (HA), hava lokið HD-prógv ella cand.merc.aud., og eru áhugaðir at halda fram við at útbúgva seg.

Eisini er tað eitt krav, at viðkomandi er fryntligur og fyrikomandi, og til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, serliga fyrru helvt av árinum.

**Framtíðarmøguleikar**
Møguleiki er fyri at nema sær tær praktisku og ástøðiligu royndirnar, sum skulu til fyri at gerast statsautoriseraður grannskoðari.

### Ungir grannskoðarar

**Útbúgvingin**
Umframt at fáa hollar arbeiðsroyndir gjøgnum dagliga arbeiðið, skulu okkara starvsfólk nema sær ástøðiliga útbúgving við at fylgja HD-undirvísingini á Føroya Handilsskúla. Harumframt verður talan um innanhýsis undirvísing, bæði hjá okkum og hjá KPMG í Danmark.

**Umsøkjarin**
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava lokið HH-prógv, og verða áhugaðir í framhaldandi útbúgving.

Eisini er tað eitt krav, at viðkomandi er fryntligur og fyrikomandi, og er til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, serliga fyrru helvt av árinum.

**Framtíðarmøguleikar**
Aftaná lokið HD-prógv er møguleiki fyri at halda áfram at nema sær ástøðiligu útbúgvingina cand.merc.aud., sum er neyðug fyri at gerast statsautoriseraður grannskoðari.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda okkum skjótast gjørligt ella í seinasta lagi innan 15. mai 2000.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Mirjam Haraldsen á telefon 34 34 34.

***KPMG í Føroyum er føroysk ogn burturav. Samstundis eru vit limir í KPMG International, sum er eitt tað størsta grannskoðanarsamtakið í heiminum.***
***Okkara mál er at veita tænastur innan grannskoðan, roknskaparhjálp, fíggjarstýring, skatt og mvg v.m. á hægsta góðskustigi.***
***Í Føroyum hava vit ein góðan og breiðan kundaskara bæði innan handil, ídnað, peningastovnar og fíggjarstovnar eins og kommunur og landið.***
***Støðuga útbúgvingin av starvsfólkunum og góðskustýring okkara ger okkum væl fyri at loysa tær uppgávur, sum verandi og komandi kundar, bæði føroyskir og útlendskir, ynskja loystar av okkum.***
***Í løtuni starvast 22 fólk hjá felagnum.***

team 85 • 31 65 11

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34, Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo, E-mail: kpmg@kpmg.fo

V&B

## Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður at seismiskar kanningar verða gjørdar í hesum øki:

millum 62º00‘N og 63º30‘N
millum 001º00‘V og 003º00‘V

Felagið NOPEC stendur fyri kanningunum.

Byrjað verður ......................... 19.04.2000
Arbeiðið tekur væntandi .......... 2 mánaðir
Skipanavn ................ Professor Polshkov
Kallibókst./Heimstaður ... UAIS, Murmansk
Kaðallongd ........................... 6000 metrar
Fiskiveiðiumboð ........ Magni Rasmussen

Samband fæst við skipið á VHF rás 16.

Upplýsingar um dagligar seismiskar fráboðanir og ávaringar fáast á sjálvvirkandi telefonskipanini 32 03 41, ella á telefon 31 10 65.

**Landssjúkrahúsið**
**FO-100 Tórshavn**

## Starvsfólk

Á Medico teknisku deild verður søkt eftir starvsfólki við útbúgving sum elektronikteknikari ella líknandi, til setan skjótast gjørligt.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Einar Venned, leiðara, tlf. 31 35 50 lokal nr. 310.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FR-100 Tórshavn.

Umsóknarfreistin: *3. mai 2000 kl. 14.00.*

**Lesið sosialin**

**DANNY TRANSPORT**
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
**Tlf. 319192**

**SUMMARDEKK**
KUMHO DEKK
EURO Tyfoon
**- ein góð loysn**
ES
Sosialurin - 311820